

# Jarðfeingi marknaðarførdi Føroyar í Madrid

**Jan Müller**

11.06.2015 - 11:06

Oljan.fo

Væntandi fara umboð fyri seismikkfeløg at koma til Føroya í næstum at fregnast um komandi útbjóðingina, sum verður í 2017. Hetta var eitt úrslitið av føroyskari luttøku á stórari søluráðstevnu í Madrid herfyri.

Síðani oljufeløg boraðu seinasta brunnin á føroyska landgrunninum hevur verið arbeitt miðvíst við eini ætlan at brúka meiri orku uppá at marknaðarføra føroyska landgrunninum úti í heimi, eitt nú á ráðstevnum av ymsum slag. Sum liður í hesi ætlan kunngjørdi landsstýrismaðurin í oljumálum, Johan Dahl herfyri, at Føroyar fara at lata upp fyri 4. útbjóðingini á landgrunninum um eini tey ár ella so. Hetta eru so boðini, sum føroyskir myndugleikar royna at fáa varpað ljós á úti í altjóða oljuheiminum.

Í farnu viku var Jarðfeingi umboðað á stóru EAGE-søluráðstevnuni í Madrid. EAGE stendur fyri European Association of Geoscientists & Engineers. Hóast hetta var 77. EAGE-ráðstevnan av sínum

slag, er hetta fyrstu ferð, at Jarðfeingi er við. Føroyska umboðanin er ein liður í nýggju marknaðarføringsvirkisskránni av føroyska landgrunninum. EAGE-ráðstevnan verður hildin annað hvørt ár, og komandi ráðstevna verður hildin í Wien.
Luttakaratalið lá um 6000 og fevndi hetta um bæði veitarafeløg, oljufeløg umframt onnur feløg frá so at siga øllum heiminum. Jarðfeingi hevði bás og framløgur við til Madrid, og básurin var væl vitjaður. Tað, sum hevði størst áhuga, var komandi loyvisumfarið í 2017. Í hesum sambandi legði Jarðfeingi seg eftir at fáa samband við seismikkfeløg, fyri á henda hátt at fáa nýggjar dátur av landgrunninum tøkar áðrenn umfarið. Hetta arbeiðið hilnaðist væl, og væntandi fara fleiri seismikkfeløg at koma til Føroyar at vitja innan stutta tíð.

Kelda: Jarðfeingi.fo